UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 17. august 2021
Journalnr.: 21/15917

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Svar upp á § 52a fyrispurning nr. 52-010/2021 frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, viðvíkjandi SEV

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin, at SEV ikki skal kunna bjóða til komandi vindorkuútboð ?
2. Um ja, er semja millum Kommunufelagið, SEV og landsstýrið um hesa ætlan ?
3. Hvørjar lógarbroytingar ætlar landsstýrismaðurin at fremja á elveitingarøkinum ?
4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um útrokningar eru gjørdar um, hvat hetta kemur at merkja fyri brúkaran av elorku ?

Svar til spurning 1 og 2

Í samgonguskjalinum stendur soljóðandi:

"Munandi meira ferð eigur at verða sett á framleiðsluna av grønari orku.
Fyri at røkka hesum málinum verður arbeitt fyri at tryggja størri kapping á framleiðslu- og sølusíðuni. Arbeitt verður við at skilja elnetið hjá SEV frá hinum virkisøkinum, soleiðis at fult gjøgnumskygni verður í kostnaðinum av netpartinum. Fult gjøgnumskygni skal vera grundarlag undir, at privatar fyritøkur skulu hava møguleika at leiga og framleiða seg inn á elnetið, og síðani selja."

Landsstýrismaðurin og umboð fyri SEV, t.e. fyrst og fremst stjórn og nevnd í SEV, men eftir kommunuvalið í heyst eisini ein bólkur av borgarstjórum vegna eigararnar av SEV, hava havt fleiri fundir um, hvussu bygnaðurin á elorkuøkinum kann skipast frameftir. Seinasti fundurin millum partarnar hesum viðvíkjandi var 9. juli 2021, har m.a. undirritaði og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tóku lut.

Grundað á ta semjuna, ið tóktist vera millum partarnar á fundinum, evnaði Umhvørvis- og vinnumálaráðið uppskot um semju millum partarnar, ið er sent SEV og Kommunufelagnum tann 16. juli 2021. Talan er ikki enn um endaliga semju, men um eitt uppskot, ið partarnir fara undir aftur at viðgera, nú summarfrítíðin er løgd afturum.

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 00 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

Semjuuppskotið snýr seg í stuttum um, at SEV fær staðfest sín leiklut sum "systemoperatørur" og "netfelag", har uppgávan er at reka elskipanina og at fremja neyðugar útbyggingar av netinum við tilhoyrandi systemeindum, sum eru neyðugar til tess at halda eina trygga elveiting, ið stuðlar undir málið um elveiting úr varandi orkukeldum. Systemoperatørurin, t.e. lutafelagið SEV, eigur og rekur allar størri og kritiskar systemeindir, undir hesum vatnorkuverkini, oljukraftverkini og komandi pumpuskipanina í Vestmanna. Semjuuppskotið snýr seg eisini um, at kappingarútsett virksemi skal ikki rekast av lutafelagnum SEV. Kappingarútsett virksemi er m.a. vindorka, sólorka og onnur framleiðsla av varandi orku inn á elnetið.

Hetta merkir tó ikki, at kommunurnar ikki framvegis kunnu luttaka í elframleiðslu úr vindi og úr øðrum varandi orkukeldum.

Í elveitingarlógini §3 stendur: "Kommunur kunnu luttaka í elveitingarvirksemi sbrt. § 1, stk 1, uttan mun til ásetingarnar í § 50, stk 1 í kommunustýrislógini."

Sostatt er onki til hindurs fyri, at kommunurnar stovna eitt felag, sum kann framleiða elorku til føroyska samfelagið. Best er, um talan verður um nýtt sjálvstøðugt felag, ið er leyst av lutafelagnum SEV, tí so kemur ikki bland millum leiklutirnar sum systemoperatørur og framleiðari, sí aktuelt dømi til seinast í svarinum. Verður hinvegin talan um dótturfelag við tilknýti til lutafelagið SEV, skal dótturfelagið hava aðra leiðslu og nevnd enn móðurfelagið. Harumframt verður neyðugt at styrkja um heimildirnar hjá elveitingareftirlitinum, ið tá skal tryggja, at systemoperatørurin ikki favoriserar egnar framleiðslueindir. Málið er javnsett kapping og handil millum óheftar partar.

Ætlanirnar hjá landsstýrinum hava í miðlunum verið umrøddar sum einskiljing av SEV. Sum tað framgongur frammanfyri, liggur als ikki í kortunum at SEV skal einskiljast. Hinvegin skal leikluturin sum systemoperatørur og netfelag sum nevnt gerast greiðari. Hetta er týdningarmikið stig í tilgongdini at skapa tíðarhóskandi karmar fyri stóru uppgávuna, sum SEV nú skal fara undir, t.e. at útbyggja net og skipanarberandi eindir og at fyrireika seg til kompleksu uppgávuna at stýra eina elskipan, sum í síni heild byggir á varandi orkukeldur og har oljukraftverkini verða tiltøkuverk.

Tað er ikki skynsamt at lutafelagið SEV, sum systemoperatørur og netfelag, eisini hevur leiklut sum framleiðslufelag í kapping við onnur framleiðslufeløg.

Vísast kann á eitt aktuelt mál, har Elveitingareftirlitið og SEV hava hvør sína áskoðan á, hvussu vindfelagið í Húsahaga skal avroknast. Tað er í eini tílíkari støðu sera óheppið, at tað eru júst somu persónar, sum hava ábyrgdina av SEV-net og Vindfelagnum í Húsahaga. Áhugamálini hjá báðum feløgunum í hesi støðuni eiga at verða mótsett og óheft av hvør øðrum, men tá feløgini eru fíggjarliga bundin og júst somu persónar sita báðumegin borðið, ber illa til at liva upp til kravið um óheftni. Hendan tvístøðan millum myndugleikan og SEV hevði verið munandi lættari at loyst, um áhugamálini hjá SEV-net og Vindfelagnum í Húsahaga ikki vóru samantvinnað við somu ábyrgdarpersónum.

Svar til spurning 3

Broytingar skulu gerast í elveitingarlógini, sum greiðari staðfesta uppgávur og skyldur hjá ymisku pørtunum á elveitingarøkinum og sum stuðla undir orkupolitikkin hjá landinum. Her kunnu m.a. nevnast uppgávur og skyldur hjá:

- Landsstýrismanninum, orkumyndugleikanum og elveitingareftirlitinum
- Systemoperatørinum

- Netfelagnum
- Framleiðslufeløgum
- Sølu- og tænastufeløgum

Harumframt kunnu væntast neyvari ásetingar um
- atgongd til lendi í sambandi við orkuútbyggingar
- hvussu orkuútbyggingar skulu bjóðast út
- loyvir til smáverk, har endamálið er eginframleiðsla og/ella søla av orku

Svar til spurning 4

Føroyska samfelagið hevur sett sær sum mál, at øll orka á landi skal vera úr varandi orkukeldum í 2030 og hevur altjóða tikið undir við Parísavtaluni, sum viðførir, at Føroyar skulu fremja munandi niðurskurð av samlaða føroyska útlátinum í 2030 og at útlátið í 2050 verður netto null. Slík mál krevja stórar útbyggingar og umleggingar av orkukervinum. M.a. skal varandi orkuframleiðslan á landi økjast úr áleið 150 GWt til áleið 1000 GWt (1 TWt) fram til 2030. Størsti parturin av hesi útbygging verður vindorka. Fyri at fáa vindorkuna til høldar er neyðugt at útbyggja orkuskipanina, so nýtslan kann tillagast tøku orkuni og at avlopsorka kann goymast og umgerast. Slík umlegging krevur fleiri aktørar, framkomna tøkni og stórar íløgur. Fyri okkum sum brúkarar av elorku merkir hetta, at vit skjótari gerast leys av olju, at vit fáa fleiri framkomnar tænastur til stýring av orkunýtsluni í húsarhaldinum og at orkurokningin sum frálíður minkar. At framleiðsla av vind- og sólorku verður løgd í annað sjálvstøðugt felag hevur ikki beinleiðis avleiðingar fyri brúkaran av elorku.

Elektrifiseringin av samfelagnum, sum er berandi parturin í grøna orkuskiftinum, fer sum nevnt at krevja risaíløgur í orkuøkið komandi árini, og tí kann ikki roknast við lægri elprísi fyrstu mongu árini. SEV heldur seg vanliga til ávíst lutfall millum fíggjarorku og skuld. Skal orkuskiftið fremjast til 2030, soleiðis sum allir partar higartil hava verið samdir um, er neyðugt at tøka fíggjarfæið (alment og privat) verður gagnnýtt á samfelagsliga skynsaman hátt. Tá er best, um SEV hugsavnar seg um at byggja út elnetið, koplingsstøðir v.m. og byggir ætlaða pumpuverkið, soleiðis at varandi orkan kemur betur til høldar. Privatir partar, og eitt møguligt kommunalt vindfelag, kunnu hinvegin hugsavna seg um at framleiða elorku úr vindi og øðrum varandi orkukeldum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið 17. august 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður